

# Stril Krúnborg: Skrokkurin um at verða liðugur

**Jan Müller**

15.09.2013 - 15:27

Oljan.fo

Tað nærkast skjótt stóru løtuni, tá nýggjasta frálandareiðaríið í Føroyum, Krúnborg Offshore, kann taka sítt fyrsta frálandaskip í brúk. Higartil er alt gingið eftir ætlanini og eru áleið 70% av skrokkinum nú liðug á pólsku skipasmiðjuni.

Stjórin í Krúnborg Offshore, Petur Jacobsen kom herfyri heimaftur av seinastu vitjan síni á skipasmiðjuni og dylur hann ikki fyri, at hann er væl nøgdur við arbeiðið og gongdina. Alt er, sum tað eigur.

Ymisku komponentarnir, sum skulu ísetast, koma so við og við, nú seinast kranaspælið og vindeygu-modulini.

“Pólendingar eru kendir fyri sítt góða sveisihandverk. Stril Krúnborg er ikki eitt undantak. Hetta er góðska á høgum støði,” sigur Petur Jacobsen.

Innrættingin verður gjørd av fyritøkuni Simek og byrjað verður uppá tað arbeiðið, tá skipið er sleipað upp til Norra.
“Simek hevur somuleiðis hesar góðu dygdir, so vit vænta okkum eitt væl frágingið arbeiði, tá liðugt er komandi ár,” sigur Petur Jacobsen.

Krúnborg Offshore eigur umleið 30% av nýggja skipinum og hevur møguleika at keypa upp størri part, tá tað ynskir hetta. Norski partnarin er stóra frálandareiðaríið Møkster.

Ætlanin er, at skipið skal latast eigarunum í apríl næsta ár.

Hjá Krúnborg Offshore fylgja teir annars væl við, hvat hendir á marknaðinum og hava umboð fyri felagið verið við á oljumessu í Aberdeen og oljuráðstevnu í Keypmannahavn. Hetta er bæði fyri at kunna seg við hesa stóru nýggju vinnu og fyri at skapa sambond.

Myndirnar eru frá arbeiðinum uppá Stril Krúnborg í Pólandi.







